# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



Marnar og Árni Andreasen:

## Handa peningin fyri stuðulsfløguna

Eftir sjónvarpsmøti í Frelsunarherinum sunnukvøldið 26. mars frá kl. 18-19, verður ein løta har brøðurnir Marnar og Árni Andreasen koma at handa Frelsunarherinum peningin, sum kom inn fyri stuðulsfløguna, teir góvu út fyri ólavsøku í fjør.

Á fløguhúsanum stendur m.a. »Allur peningurin sum kemur inn fer óskerdur til Frelsunarherin at stuðla teimum í tí andaliga og sosiala arbeiðinum sum Frelsunarherurin stendur fyri«.

## Selma í Focus

Fríggjadagin 24. mars kl. 16 letur ein framsýning við málningum hjá Selmu Mikladal upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Á framsýninginí eru 22 málningar.

Selma Mikladal er født í 1954 í Klaksvík, er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur búð í Keypmannahavn í mong ár.

Hon hevði sína fyrstu málningaframsýning í Føroyahúsinum í Keypmannahavn í 2005. Selma kom til Føroya hósdagin.

Framsýningin verður opin til 6. apríl, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.




*Selma Mikladal hevur í hesum døgum málningaframsýning í Galerie Focus*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Skeiðsdepilin:

## Tíggju diplomleiðarar fingið prógv



Í sambandi við at tað triðja diplomleiðaraliðið á Skeiðsdeplinum er liðugt við útbúgvingina innan praktiska leiðslu, vórðu prógvini handað á eini hugnaløtu á Skúlaheiminum við Marknagil hósdagin tann 17. mars 2006.

Hesi hava staðið próvtøkuna (navn og arbeiðspláss): Anna Maria Joensen, Heygabúðin, Asbjørn Mikkelsen, Elektron, Asta Joensen, Landssjúkrahúsið, Bo W. Mogensen, Føroya Sparikassi, Eydna M. Midjord, Hósvíkar Skúli, Gudna á Rógvi Olsen, Landssjúkrahúsið, Henry Olsen, Tryggingarfelagið Føroyar, Ingun Gaardbo, Landssjúkrahúsið, Jákup Andreasen, Fiskivinnuskúlin, og Petur í Gong, Pf. Elmar Zachariassen. Eydna M. Midjord og Bo W. Mogensen vanta á myndini.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddа barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin